



## Seat Leon 1,9 TDi

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.9 l 4 syl.<br>TDi 90 HK |
| 0-100 km/t | 12,7 sek |
| Oljunýtsla | 19,6 km/l |
| Stødd | |
| Longd | 418 cm |
| Breidd | 175 cm |
| Hædd | 144 cm |
| Viðførisrúm | 340 litrar |
| Søluumboð | P/F Bilasølan<br>v/ Øssur Johannesen<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík |

MAGNUS GUNNARSSON

Tað verður sagt, at nú er líka lítið av Spania í Seat bilunum, sum tað er Wien í einum wienarbreyði. Í dag eigur VW sponsku Seat bilverksmiðjuna við húð og hár. Tað sæst eisini á Seat bilunum, sum í veruleikanum eru VW bilar við sínum egna samleika.

**Leon fær gott ummæli**

Danska bilblaðið, Bilen Motor & Sport, skrivar í januar útgávuni um Seat Leon: »Komfortabel langtursbil på motorvejen og kompetent kurveknuser på snævre bjergveje. Balancen er fin, og undervognen arbejder perfekt.«

Leon er hatchback útgávan av Seat Toledo, sum eisini er bygdur yvir ein VW Golf plattform. Leon er praktiskur við stórari baklúku, og setrini kunnu leggjast niður. Lætt er at seta seg til rættis, tá tú skalt koyra bilin. Forsetrið kann stillast í hædd, og rættið stillast upp og niður, aftur og fram, eins og ABS bremsur við elektroniskum bremsufordeilara og klimaanlegg er standardútgerð í bilinum.

Seat Leon hevur sjey motorar at velja ímillum, 4 bensin og 3 dieselmotorar. Tað at karrossariíð er fult galvaniserað gevur 12 ára garanti ímóti gjøgnumtering.

# VW Golf V6 4 Motion

VW Golf V6 4 Motion er bilurin til tey, ið ynskja sær ein »diskretan luksusbil«. Bilurin líkist einum vanligum VW Golf, men tað tú skalt leggja til merkis er t.d., at hann hevur 16" sportfelgur, undirvognurin er senkaður, tvey forkromað útstoytsrør, V6 emblem framman og á baklúkuni stendur V6 4 motion.

## VW Golf V6 4 Motion

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.8 l V6<br>bensin 204 HK |
| 0-100 | 7,1 sek / 6 gear |
| Bensinnýtsla | 9,3 km/l |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Prísur | kr 306.000 |
| Søluumboð | P/F Bilasølan<br>v/ Øssur Johannesen<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík |














# Linjurnar eru nærmast fullkomnar



*Útsjóndin á Audi TT er so háttað, at hann vekjur undran, har hann kemur. Tær rundu og bleytu linjurnar eru nærmast fullkomnar. Eisini sæst væl, at VW Beetle og Audi TT eru í nærmastu familju*





*Tá tú setur teg handan rættið í Audi TT - tá merkir tú, at tað eru veruliga nógvar hestakreftir, tú hevur við at gera. Tú leggur fótin varisliga á speedaran*

**Myndir: Jens Kristian Vang**

## Audi TT Quattro Coupé

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.8 l 4 syl<br>5V-teknik 225 HK |
| 0-100 km/t | 6,4 sek/6 gear |
| Bensinnýtsla | 10,9 km/l |
| Dekkstødd | 225/45-17 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 404,1 |
| Breidd | 185,6 |
| Hædd | 134,5 |
| Eginvekt | 1395 kg |
| Viðførisrúm | 220 litrar |
| Prísur | 518.000 kr |
| Søluumboð | P/F Bilasølan<br>v/ Øssur Johannesen<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík |

MAGNUS GUNNARSSON

Audi TT er ein tann mest gjøgnumførdi bilur, sum er gjørdur í longri tíð og er ein sonn frægd fyri eyga.

Tá tú ert komin at sita í bilinum, ið er lágur at koma inn í, merkist, at her er alt væl gjørt, heilt niður í smálutir.

Á baksetrinum er pláss til børn ella smærri fólk. Tað er eisini í lagi, tí tað var ongantíð ætlanin, at Audi TT skuldi verða ein bilur til alla familjuna. Tó hevur hann eitt hampuliga stórt viðførisrúm, og við at leggja baksetrini fram, fáast 540 litrar at ráa yvir.

**Sum ein dreymur…**

Tá tú setur teg handan rættið í Audi TT - tá merkir tú, at tað eru veruliga nógvar hestakreftir, tú hevur við at gera. Tú leggur fótin varisliga á speedaran - og bilurin flýgur avstað. Tú merkir dupultu turbo'ina og allar tær 225 hestakreftirnar undir hjálminum.

Ein sonn fragd at koyra…

**Næstan alt er standardútgerð**

Útsjóndin á Audi TT er so háttað, at hann vekjur undran, har hann kemur. Tær rundu og bleytu linjurnar eru nærmast fullkomnar. Eisini sæst væl, at VW Beetle og Audi TT eru í nærmastu familju, og eru bygdir yvir ein broyttan VW Golf plattform.

Audi TT hevur næstan alt sum standardútgerð, so sum dupult airbag, síðuairbag, ABS bremsur, antispin (ASR), el-síðurútar, fjarstýrt sentrallás, leðursetur og automatiskt klimaanlegg.

Tey sum hava hug at slappa av og droyma eina løtu, kunnu koma á bilframsýningina í Havn og síggja bilin.

